# al akta

hon ikki respekt fyri manni sínum, er alt annað líkamikið. Týdningarmiklasti eginleikin hjá eini kvinnu er heilt greitt, at hon dugir at vísa respekt; aktar hon ikki mannin, kann hann senda hana burtur, sigur hann. Menn kunnu jú ikki liva saman við eini kvinnu, sum heldur, hon veit betur enn hann. Sjálvandi skal maðurin vera tolin, men tað er hann, sum skal seta grensurnar. Tað er ei heldur sjáldsamt, at kvinnur verða beindar burtar – tað hendir nú á døgum rættiliga ofta, at tær ikki lurta eftir manninum og so er jú einki annað at gera.

## Eingin vegur út?

Eftir at hava tosað við Souliy, sum umboðar gamaldags kvinnufatanina, og Amou, ið tykist glað fyri lívið sum tænarin hjá manni sínum, verði eg eitt sindur vónleys.

Er tað yvirhøvur møguligt at broyta hetta kynsbýtið, sum í so mong ár hevur verið við til at halda nigersku kvinnunum niðri? Kann man hjálpa fólki, sum ikki vilja hjálpast? Kann man hjálpa kvinnum, sum sjálvar halda seg klára seg væl? Ella kanska er hetta als ikki rætti vinkulin uppá tað. Eg verði samd við meg sjálva í, at kvinnurnar í øllum førum skulu sleppa at hoyra um rættindi teirra og sjálvar velja lívið, tær ynskja at liva. Um tær so velja at halda áfram, sum tær áður hava gjørt, er tað teirra val. Tær hava her í øllum havt møguleikan fyri at velja. Í nigersku lógini stendur nevniliga, at kvinnur og menn at kalla eru jøvn – tað tykist bara ikki sum, at samfelagið verður útint á henda hátt.

Fyri at fáa svar uppá nógvu spurningar mínar, leiti eg meg fram til eina kvinnu, sum í fleiri ár hevur verið forkvinna í felagsskapinum AME, sum arbeiðir fyri kvinnurættindum í Niger.

- Eftir at fokus í langa tíð hevur verið á kvinnurættindi og felagsskapir sum AME hava sett fokus á at stuðla kvinnum, eru nigersku kvinnurnar vorðnar meiri sjálvstøðugar. Tær hava nú sjálvar nakrar møguleikar og ressursir til at gera ymiskt, sigur Indo Oumarou. – Nógvar kvinnur hava sæð, at útbúgving veruliga er vegurin fram eftir – eisini fyri genturnar. Áður hildu tær døtrarnar heima fyri, at tær kundu hjálpa til í húsarhaldinum, men nú hugsa tær fyrst og fremst um at senda tær í skúla. Eg eri vís í, at tað at senda eina gentu í skúla fer at hjálpa samfelagnum at flyta seg rættan vegin. Í lógini stendur, at øll børn skulu hava møguleika fyri at ganga í skúla og hetta má samfelagið sjálvandi royna at liva upp til. Í Niger hava vit ein talumáta, sum sigur, at kvinnurnar áður høvdu høvd teirra í einum ílati, men nú er hetta ílatið burtur og eygu teirra eru opin.



*Souliy, leiðari av nomadu-fulani-bygdini Kaima leggur lítið í, um ein kvinna er vøkur ella klók – aktar hon ikki mannin, er hon ikki ein góð kvinna*



**Navn:** Rashida Abdou
**Aldur:** 18
**Familja:** Eg havi átta systkin, har av hava trý gingið í skúla. Pápi mín er bóndi og marabou (marabou er eins bønarleiðarin í Niger red.) og mamma mín heldur hús heima.
**Status:** Eg havi verið gift við manni mínum í trý ár. Vit møttust á felagsplássinum í bygdini eitt kvøldið og vórðu forelskaði. Í dag hava vit ein lítlan son saman, sum er tvey ára gamal.
**Bústaður:** Eg búgvi í bygdini Kaima, sum liggur 1½ tíma frá Maradi (ið er næststørsti býurin í Niger red.), saman við manni mínum og fyrstu konu hansara. Áðrenn hann møtti mær, varð hann giftur við einari aðrari kvinnu, sum hann hevur fýra børn saman við. Vit hava tað gott saman, 1. konan og eg, og vit deilast um tað dagliga arbeiðið.
**Útbúgving:** Eg havi ongantíð sjálv gingið í skúla, men eg haldi tað vera sera týdningarmikið at nema sær útbúgving og tí vóni eg eisini, at sonur mín fær møguleika fyri at ganga í skúla, tá ið hann verður eldri.
**Soleiðis sær ein vanligur dagur út:** Vanliga fari eg upp kl. 5 um morgunin fyri at banka hirsi og gera mat til mannin hjá mær. Eftir at hann er farin út í markina, arbeiði eg heima við m.a. at gera hirsibollar og at fara eftir vatni. Um middagsleitið geri eg mat, sum eg fari út við til mann mín í markina, har eg eisini hjálpi honum við arbeiðinum í nakrar tímar. Tá ið eg komi heim aftur seint um dagin, hvíli eg meg, áðrenn eg skal gera mat til familjuna. Eftir at maður mín hevur biðið kvøldarbørn kl. 20, fari eg útlúgvað í song.
**Frítíðarítriv:** Tá ið eg havi frí, vitji eg familju mína ella vinir mínar.
**Størsta ynski/framtíðardreymur?** Hægsta ynski mítt er einaferð at eiga nóg mikið av peningi til at fáa eina tænastugentu at hjálpa mær, so eg sjálv kann hvíla meg av og á.



**Navn:** Barbara Vang
**Aldur:** 18 ár
**Bústaður:** Tórshavn
**Familja:** Mín nærmasta familja er deiliga stór, men eitt sindur trupul at greiða frá. Eg búgvi saman við mammu míni, manni hennara og einum 6-ára gomlum hálvbeiggja. Eg havi tó eisini sera tætt samband við pápa mín, konu hansara og tveir hálvbeiggjar, sum eru 3 ár og 1 mánaða, hóast tey í løtuni búgva í Brasilia.
**Civilstatus:** Støk
**Útbúgving:** Eg gangi í 2.s á málsligu deild í Hoydølum
**Frítíðarítriv:** Tað eru nógv ymisk ting, ið mær væl dámar at takast við í frítíðini. Eg elski at vera kreativ - at taka myndir, tekna og mála. Eg eri skóti og haldi, at náttúran er sera hugtakandi. Annars eri eg eisini áhuga í bókmentum, tónleiki og list - í tað heila tikið mentan; bæði føroyskari og útlendskari. Alt hatta royni eg at fáa tíð til út yvir skúlating og "frítíðar størv".
Ein vanligur dagur: Ein vanligan dag seti eg vekkaran til kl. 6.30, men útseti hann vanliga 10 min. hvørja ferð til klokkan verður uml. 7, tá byrji eg so smátt at vera vakin og minnast til, at eg jú skal í skúla. Eg skundi mær so upp, lúri ígjøgnum persiennirnar fyri at vita hvussu veðrið er, lati meg í og eti morgunmat við einum góðum temunni afturvið. Knappliga plagar klokkan so at vera so nógv, at eg bara má skunda mær avstað og renna yvir til bussin. Eg eri í skúla til uml. kl. 14-15. Tá eg havi frí, skal eg onkrar dagar beint til arbeiðis. Annars fari eg sum oftast heim og royni at koma ígjøgnum bunkan av skúlatingum. Náttúrðin verður sum oftast etin við familjuni kl. 18. Aftaná tað fari eg kanska út við vinum, geri okkurt, eg havi hug til, fari á fund ella haldi áfram við skúlatingum. Tá klokkan verður uml. 22 byrji eg at hugsa um at fara í song og kl. 23 liggi eg væl ballað við einari góðari bók og lesi til eyguni ikki orka meira.
**Ynskir/dreymar:** Tá tað kemur til framtíðina, so er ikki so nógv annað at siga enn – tað má tíðin vísa. Eg ynski peace, love and understanding og so ynski eg, at so nógv sum gjørligt mugu fáa eitt gott og innihaldsríkt lív. Annars ynski eg at sleppa at ferðast nógv og uppliva ymisk fólkasløg og mentanir, kanska eg so finni meg sjálva onkrastaðni har úti í tí stóru verðini, haha.